

Ein av boripallinum hjá Statoil, Gullfaks A. Mynd: Harald Pettersen - Statoil ASA

# Hægri virði - men sel Statoil-partabrøvini

**Jógvan Hugo Gardar**

24.08.2014 - 11:57

Oljan.fo

Ein av greiningarfyritøkunum sum fylgja oljupartabrøvunum á keypsskálanum í Oslo, DNB Markets, kom fríggjadagin við eini nýggjari meting av Statoil. Hetta eru metingar sum tey gera nakrar ferðir um árið, og ráðgeva sínum íleggjarum um hvar teir eiga at umhugsa at seta pengar í, ella nær teir eiga at selja.

Metingin hjá DNB Markets sigur at virði á Statoil-partabrævinum kemur at økja, og at teir seta sítt kursmál frá 155 norskar krónur til 165 norskar krónur. Hægsta virði hjá Statoil higartil í ár var góðar 193 krónur fyri partabrævið. Í gjár var prísurin komin niður móti 173 norskar krónur.

Metingin hjá DNB Markets merkir at teir hava eitt sindur meir álit á Statoil yvir tíð, enn teir høvdu seinast tey mettu um fyritøkuna. Greiningarfyritøkan heldur at tey sum hava hesi partabrøvini í løtuni eiga at umhugsa at selja, skrivar TDN Finans.

Orsøkin til at DNB Markets hevur økt prísmetingina er at ein roknar við at prísurin á olju hækkar í 2018-2019 við tveimum-trimum dollarum til 95 dollarar fyri fatið.